**FÓLKATINGSVALIÐ 2001**

# Eitt virðiligt umboð á fólkating

**Annfinn Brekkstein**
*vælevni sambandsfloksins*



Nú fólkatingsval er fyri framman, hevur Føroya fólk møguleikan at siga ja til ríkisfelagsskapin ella nei. Ein atkvøða til sambandsflokkin er eitt ja til ríkisfelagsskapin og harvið ja til framhaldandi samstarv við Danmark, sum vit hava samstarvað við í 600 ár. Eitt fólkatingsumboð hjá sambandsflokkinum fer framhaldandi at varðveita og menna vælferðarsamfelagið Føroyar innan karmarnar í ríkisfelagsskapinum. Eitt sambandsumboð á fólkatingi fer at arbeiða við at fáa heimastýrislógina dagførda soleiðis, at hon verður orðað við umhugsni bæði fyri tí menningini, sum hevur verið, síðan hon kom í gildið, og í samsvar við viðurskiftini, sum tey eru í dag.

Sum nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum sigur: vit skulu greiða ríkisrættarligu viðurskiftini, har tey eru ógreið.

Eg eri ein av teimun, sum havi tað áskoðan, at vit alla tíðina hava ment okkum sum samfelag, tí vit eru í ríkisfelagskapi við Danmark.

Føroya Fólk vil framhaldandi varðveita vælferðarsamfelagið Føroyar, tað krevur at vit fáa umboðan á fólkating fyri framhaldani at menna samstarvið millum londini í ríkinum.

Vilt tú verða við at geva komandi ættarliðum fjølbroyttar møguleikar í altjóða høpi, so vel sambandsflokkin; hann gevur tær møguleikan.

**Av misgávum komu vit at skíra Annfinn Brekkstein fyri fólkaflokksvalevni í mikudagsblaðnum. Hann er sambandasmaður. Haldið okkum til góðar.**
*blaðstjórnin*

# Hvar gongur leiðin. Hvar er landsstýrið á veg við fólkinum?

**Edmund Joensen,**
*fólkatingsvalevni sambandfloksins*



Tak kennist sum ein djúp gjógv er ímillum fólkið og samgongupolitikarar.

– Tað er ein veruleiki, at Føroya Landsstýri stevnir okkara landi út úr ríkisfelagsskapinum. Løgtingið (samgonguflokkarnir), hava samtykt eina loysingarætlan, sum skal enda í 2012.

– Tað er ein veruleiki, at landsstýrið og samgongan eru til reiðar at avreiða felags ríkisborgararættin hjá føroyingum.

– Tað er ein veruleiki, at um ein góðan mánaða skerja landsstýrið og samgongan ríkisveitingina við umleið 400 mió. krónum beinanvegin. Hetta er bert fyrsta stigið í ætlan landsstýrisins.

**20 vælferðarsamfeløg**

Føroyar eru eitt av 20 vælferðarsamfeløgum í øllum heiminum. Føroyar eru við fullari ferð á veg úr hesum exklusiva klubba av vælferðarsamfeløgum.

Hetta hevur sjálvandi sera álvarsligar og víttfevnandi fylgjur við sær, fyri hvønn einasta føroying og alt tað føroyska samfelagið.

Tað er forkastiligt, at Føroya fólk ikki hevur fingið møguleikan at taka støðu fyri ella ímóti hesi ætlan. Landsstýrið er jú lopið frá lyftunum um, at alt skuldi leggjast fyri Føroya fólk til fólkaatkvøðu, áðrenn nakað stig varð tikið. Landsstýrið er lopið frá lyftunum um demokratiska gongd.

Tað er ein sannroynd, at føroyskir politikarar hava sett uppá spæl trygdina hjá ungum sum hjá eldri í Føroyum.

Ein sannroynd er tað eisini, at politikarar, sum standa aftanfyri loysingarætlanina, ikki vilja viðurkenna, at avleiðingarnar koma at kosta vælferðina, og koma at kennast inní hvønn krók í landinum.

Tað kennist sum at ein djúp gjógv er ímillum samgongupolitikarar og Føroya fólk.

Á fólkatingsvalinum týsdagin hevur Føroya fólk møguleikan at siga frá síni erligu støðu.

# Stívrent samband fremur loysing

**Kristian Magnussen,**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Tað er nógv, ið týðir uppá, at fólk til hetta fólkatingsvalið nýta høvið til at staðfesta sína støðu í ríkisrættarspurninginum. Tey flestu orka ikki longur at hoyra um samband, loysing, ríkisveiting, frælsi, evstavald, tjóðarspurningin og um sjálvsavgerðarættin. Tey hava kvalma aftaná eitt heilt valskeið, har samgongan einans hevur borðreitt við akademiskum spurningum við haravfylgjandi stríði og klandri.

Tey, ið halda seg binda um heilan fingur við at atkvøða fyri flokkum ytst á sambands- og loysingarvonginum, eiga at hugsa seg um, tí hesir flokkar megna ikki at samansjóða loysnir á sjálvstýrisleið. Stívrend sambandsstøða er lívsgrundarlagið hjá veruleikafjarum loysingarmonnum.

Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum er ein loysn, ið flestu føroyingar kunnu taka undir við. Sjálvstýrislógin er ein sáttmáli millum okkum og danir, sum ongar avmarkingar hevur. Hon ásetir, at vit taka tann suverenitet, ið vit gera av innan ymsu málsøkini, ið enn eru ríkismál. Somuleiðis inniheldur sáttmálin ásetingar um, hvørjar mannagongdir, ið skulu fylgjast, um vit avgera at fara úr ríkinum. Sáttmálin verður fráboðaður ST, ið vit kunnu venda okkum til í trætumálum.

Tað einasta, henda loysnin manglar, er forfongiligheitina, ið nøkur ikki kunnu liva uttan. Lat tað ikki verða okkara trupulleika. Latið teir putlast við teirra dagdvøljur.

Latum okkum nú savnast um sjálvstýrislógina, soleiðis at vit frígera samfelagsorkuna til at taka okkum av øllum teimum viðurskiftum, ið ikki eru raðfest seinastu árini.

Sum eitt lítið land koma vit altíð at hava sama trupulleikan, sum tey smáu altíð hava ímóti teimum stóru. Javnaðarflokkurin er ikki í iva um, at vit eru betur farin í javnbjóðis samstarvi við annað lítið land, ið eisini hevur sítt tógva stríð við at standa ímóti teimum stóru.

Melda vit okkum úr felagskapinum, so missa vit møguleikan at taka ímóti natúrliga solidaritetinum, tá ástendur.

Spyr tí teg sjálvan, um tað verður hugaligari at standa við hattinum í hondini í Heimsbankanum og í IMF, ella um vit eiga at verja tann betra møguleikan.

Gott val

# Tala sak føroyinga

**Jógvan Arge**
*valevni tjóðveldisfloksins til fólkatingið*



Neyðugt er at gera skil á viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Mest týðandi fyritreytin fyri hesum tykir mær at vera ein sterkur tjóðveldisflokkur.

Tí royni eg at gera mítt til at fáa ein væl umboðaðan tjóðveldisflokk á danating at tala sak føroyinga. Hepnast tað, so haldi eg meg hava verið við til at gera eina góða gerð. Men eg geri onki einsamallur. Vit mugu lyfta í flokki.

Ein sterkur tjóðveldisflokkur er trygdin fyri, at fullveldisgongdin heldur fram og verður framd í verki. Á hesum valinum eiga sjálvstýrissinnaðir føroyingar at vísa, at vit meina nakað við fullveldisætlanina, og at vit standa við hana, hóast mótparturin vil kveistra hana av borðinum.

Alt, sum stjórnin í Keypmannahavn hevur gjørt seinastu fýra árini, hevur prógvað, at hon vil ikki sleppa harradøminum yvir Føroyum. Hon vil ikki virka fyri einum sjálvberandi búskapi í Føroyum. Hon vil ikki viðurkenna føroyingar sum tjóð. Hon vil ikki viðurkenna sjálvsavgerðarrætt føroyinga ella føroyska málið sum tjóðarmál í Føroyum.

Henda støða er bæði óvirðilig og ótíðarhóskandi. Í Føroyum valdar full semja um, at føroyingar eru sjálvstøðug tjóð. At føroyskt er tjóðarmál føroyinga. At føroyingar eiga ognarrættin til sítt egna land. Og at flaggið er okkara tjóðarmerki.

Tjóðarbyggingin farnu øldina hevur skapt hesa sjálvsøgdu semju millum føroyingar, og tí er tað natúrligt, at Føroyar ganga longur fram á sjálvstýrisleið og gerast sjálvstøðugar. Men ongin hevur talað greitt fyri hesi stevnu á fólkatingi. Tí stillar Tjóðveldisflokkurin upp hesaferð.

Tjóðveldisflokkurin vil fegin tala líka greitt, sum Thorstein Petersen gjørdi, tá hann dagarnar eftir fólkaatkvøðuna í 1946 av formanspallinum í løgtinginum lýsti Føroyar fullveldisríki at vera.

Farið tí allir sjálvstýrissinnaðir føroyingar endiliga á val týsdagin og setið ein sterkan tjóðveldisflokk á fólkating. Tá gera vit eina góða gerð, og tað er tala, sum fer at muna.

X v E á valdegnum.

# hygg & hoyr

**Frá fríggjadegi 16. november til hósdagin 22. november**

## Valsending úr Norðurlandahúsinum

*– beinleiðis samsending við ÚF*




*Sunnukvøldið fyri fólkatingsvalið verður sent beinleiðis frá valfundinum í Norðurlandahúsinum. Á hesum fundinum fáa flokkarnir tillutað eitt ávíst minutt-tal hvør, sum so kann býtast millum ymiskt valevni.*

## Dawsons Creek



*Pacey og Joey royna at fáa eitt sindur av tíð saman – tveyeini. Samtundis fær Dawson eitt kvøld einsamallur saman við Gretchen. Jack verður mistonkiligur yvirfyri Jen, tá ið hon sendir hann fleiri merkisverd ørindi.*

3 Týskvøldið kl. 19.00

## Okkara matstovur




## Rangt og rætt 5:8




## Robinson Ekspeditionen




## Flere øjne i natten

